Bólkur A:

Byrjaði við sensatión

Heimsmeistara-kappingin byrjaði við einari sensatión, tá Senegal vann á Fraklandi, og við sigrinum á Uruguay liggur Danmark nú væl fyri í kappingini

HM-FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Ikki síðani sigurin hjá Cameroon á Argentina fyri 12 árum síðani, hevur talan verið um eitt somikið óvæntað úrslit, sum tá verandi meistararnir úr Fraklandi settu HM-endaspælið.

Mótstøðuliðið vóru HM-debutantarnir úr Senegal, og tó at teir hava staðið seg væl í afrikonsku kappingunum seinnu árini, so var ein sigur til meistararnar ikki annað enn væntandi.

Sum kunnugt, so endaði alt tó so øgiliga nógv øðrvísi. Frá fyrsta bríksli vóru tað undirmettu senegalesarnir, sum sýndu størri ágrýtni, og skjótt var greitt, at tað so avgjørt ikki skuldi verða talan um nakran lættan dyst hjá meistarunum.

Tá Papa Bouba Diop so á hálva tímanum legði Senegal á odda, frysti alt mest sum fast hjá Fraklandi. Uttan Zidane at opna tøttu verjuna skaptu teir ikki stórvegis av møguleikum, og hóast teir í seinna hálvleiki nakrar ferðirnar lógu framvið, so var hetta ongan tíð úrslitið av veruligum gjøgnumspældum álopum.

Danir góða byrjan

Úrslitið hjá Fraklandi legði kanska størri trýst á bæði Danmark og Uruguay, tí ein møguligur tapari í hesum dystinum nú fór at fáa meira enn trupult við at koma víðari í kappingini.

Við tveimum málum frá altíð vandamikla Jon Dahl Tomasson eydnaðist eisini dønum at vinna uppgerðina, og nú tykjast treytirnar hjá dønum í øllum førum greiðar. Ein sigur á Senegal í næsta dystinum vil eftir øllum at døma tryggja teimum víaðari luttøku, men tað kann eisini verða, at teir skulu hava stig móti Fraklandi í seinasta dystinum.

Hinvegin stendur verri til hjá Fraklandi og Uruguay. Bæði liðini hava helst tørv á seks stigum í báðum teimum næstu dystunum, so roknast kann við, at uppgerðin teirra millum hósdagin fer at merkja farvæl til í øllum førum annan partin.

Úrslit:

Frakland-Senegal 0-1 (0-1)
0-1: Papa Bouba Diop, 30.

Uruguay-Danmark 1-2 (0-1)
0-1: Jon Dahl Tomasson, 45.
1-1: Dario Rodriguez, 47.
1-2: Jon Dal Tomasson, 84.

Bólkur B:

Zuma bjargaði Suður Afrika

Spania hevur sum væntað lagt seg á odda í bólki B, men í aðrar mátar stendur alt framvegis púrasta opið

HM-FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Í bólki B varð undan kappingini mett, at Spania fór at vísa seg sum klárt sterkasta liðið, og fyrsta umfarið hevur á ongan hátt mótprógvað hesum.

Spaniólar vunnu sunnudagin 3-1 á Slovenia, og hóast sigurin kanska ikki var so tryggur, sum tølini sýna, so var tað fyri tað mesta Spania, sum hevði tamarhald á støðuni. Kanska hevði støðan verið ein onnur, um Cimirotic hevði fingið brotsspark, tá hann eftir øllum at døma varð feldur í brotsteiginum, men ta ferðia tagnaði floytan. Ístaðin fekk Spania brotsspark í seinastu minuttunum, so Hierro kundi avgera.

Óneyðugt brotsspark

Fyrr um dagin høvdu Paraguay og Suður Afrika spælt javnt 2-2, og lítið er at ivast í, at hetta úrslitið hóvaði afrikanarunum betri.

Paraguay tóktist nevnliga at hava fullkomuliga tamarhald á, tá Arce í 55. minutti hevði økt upp í 2-0, og so tóku teir seg annars aftur á vøllin at verja leiðsluna. Heldur ikki eftir at Struway hevði minkað um munin, tóktist sigurin av álvara at vera í vanda, men í seinasta minuttinum gekk galið.

Óroyndi málverjin, Tavarelli, sum vardi málið fyri Chilavert, framdi í púrasta vandaleysari støðu brotsspark móti FCK-leikaranum, Sibusiso Zuma, og so kundi Quinton Fortune fáa javnvág í roknskapin.

Javnleikurin hevur um ikki annað við sær, at tað framvegis er púrasta opið, hvør fer víðari úr bólkinum saman við Spania.Um nakað, so hevur Suður Afrika her ein fyrimun, tí teir eiga seinasta dystin móti spaniólum, og um hesir longu tá eru tryggir, verða summir av vanliga føstu monnunum helst spardir.

Úrslit:

Paraguay-Suður Afrika 2-2 (1-0)
1-0: Roque Santa Cruz, 39.
2-0: Francisco Arce, 55.
2-1: Estanislao Struway, 63.
2-2: Quinton Fortuna, 90.

Spania-Slovenia 3-1 (1-0)
1-0: Raul González, 44.
2-0: Juan Carlos Valerón, 74.
2-1: Segastjan Cimirotic, 82.
3-1: Fernando Hierro, 88.

Bólkur E:

Týskur metsigur

Týskland vann sín størsta HM-sigur nakrantíð, tá teir knústu Saudi Arabia, og Írland sýndi, at liðið er meira og annað enn Roy Keane

HM-FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað var ein sonn uppvísing í styrkismuni, tá Týskland og Saudi Arabia leygardagin avgreiddu sín dyst.

Týskland vann ikki minni enn 8-0, men meira enn at vera eitt tekin um týska styrki var dysturin ein framsýning av arabiskum veikleikum. Serstakliga hevði liðið trupulleikar av bóltum, sum vóru sendir innfyri, og vóru ikki færri enn fimm av fyrstu seks týsku málunum sett inn við høvdinum. Harav øll trý hjá lítla Miroslav Klose.

Við sigrinum tryggjaðu týskararnir sær í øllum førum eitt framúr gott útgangsstøði til víðari luttøku í kappingini. Góði málmunurin ger nevnliga, at tað eftir øllum at døma er nóg mikið við einum stigi í teimum báðum írestandi dystunum til tess at tryggja sær pláss í 1/8-finaluni.

Írland er við

Góða týska útgangsstøðan varð partvíst tryggjað leygarmorgunin, tá Írland og Cameroon býttu stigini millum sín.

Nógv hevur annars verið tosað um, at Írland ikki megnaði at standa seg uttan Roy Keane, sum varð sendur heim av venjingarleguni, men fyribils hava teir so gjørt hesum spádómi fyri skommum.

Í fyrra hálvleiki var tað kanska Cameroon, sum átti mesta spælið, men í seinna hálvleiki svaraðu írar av álvara aftur, og bert svartasta óhepni forðai teimum í at skjóta meira enn tað eina málið, sum Matt Holland skeyt stutt eftir steðgin.

Úrslit:

Írland-Cameroon 1-1 (0-1)
0-1: Patrick Mboma, 39.
1-1: Matt Holland, 53.

Týskland-Saudi Arabia 8-0 (4-0)
1-0: Miroslav Klose, 20.
2-0: Miroslav Klose, 25.
3-0: Michael Ballack, 40.
4-0: Carsten Jancker, 45.
5-0: Miroslav Klose, 69.
6-0: Thomas Linke, 73.
7-0: Oliver Bierhoff, 74.
8-0: Bernd Schneider, 90

Bólkur F:

Torført hjá Onglandi

Sum vant tykist talan verða um lagnudyst, tá Ongland og Argentina hittast. Tapir Ongland líkist hetta mest einum farvæl til HM

HM-FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Dystirin millum Ongland og Argentina hava altíð verið nakað serligt í HM-høpi. Mest sum hvørja ferð londini eru brostin saman, hevur talan verið um sera avgerandi dystir, og mest sum hvørja ferð hevur dramatikkurin verið í hásætinum, meðan spælt er. Hvør minnist ikki hondina hjá Maradona í '86 ella reyða kortið hjá Beckham í 1998.

Fríggjadagin komandi hittast liðini aftur, og tó at hesi dysturin er í innleiðandi bólkspælinum, so tykist hann fyri Ongland at vera mest sum avgerandi fyri, hvørt teir koma víðari í kappingini.

Trupul støða

Við javnleikinum móti Svoríki settu onglendingar seg nevnliga í ringast hugsandi støðuna. Ikki minst, tí sviar eiga seinasta dystin móti Argentina, og tá kann somikið nógv longu vera avgjørt, at Argentina at kalla einki hevur at spæla fyri tann dystin.

Og so skulu Eriksson og hansara menn eisini vera fegnir um, at tað eydnaðist teimum at fáa javnleikin. Kanska var Ongland við yvirlutan í fyrra hálvleiki, men teir skaptu fáar møguleikar, og tað var eitt sindur sigandi, at eitt hornaspark skuldi til, áðrenn teir fingu skorað.

Í seinna var tað hinvegin Svoríki, sum hevði yvirvágna, og í mun til Ongland, so skaptu teir eisini hópin av møguleikum, og var tað ikki fyri ein væl spælandi Davic Seaman, so kundi talan eins væl verið um tap.

Batigol

Argentina greiddi sína skyldu í hinum dysinum í deyðans bólki. Nigeria hevur verið mett sum eitt hitt sterkasta afrikanska landið, men teir formáddu sær lítið móti favorittunum.

Bert eittans mál kom í dystinum, og var tað metmaðurin, Gabriel Batistuta, sum úr spískum stútaði eitt hornaspark í netið. Við hesum hevur Batigol gjørt 56 mál í sínum 76 landsdystum, og er hetta nógv tað mesta, sum nakar argentinskur landsliðsleikari hevur gjørt.

Úrslit:

Argentina-Nigeria 1-0 (0-0)
1-0: Gabriel Batistuta, 63.

Ongland-Svoríki 1-1
1-0: Sol Campbell, 24.
1-1: Niclas Alexandersson, 59.

Máltindurin

Miroslav Klose	Týskland	3
Jon Dahl Tomasson	Danmark	2
Ganriel Omar Batistuta	Argentina	1
Rivaldo	Brasilia	1
Ronaldo	Brasilia	1
Patrick Mboma	Cameroon	1
Matt Holland	Írland	1
Cuauhtemoc Blanco	Mexico	1
Sol Campbell	Ongland	1
Francisco Arce	Paraguay	1
Roque Santa Cruz	Paraguay	1
Papa Bouba Diop	Senagal	1
Sedastjan Cimirotic	Slovenia	1
Fernando Hierro	Spania	1
Juan Carlos Valerón	Spania	1
Raul González	Spania	1
Estanislao Struway	Suður Afrika	1
Quinton Fortuna	Suður Afrika	1
Niclas Alexandersson	Svoríki	1
Bernd Schneider	Týskland	1
Carsten Jancker	Týskland	1
Michael Ballack	Týskland	1
Oliver Bierhoff	Týskland	1
Thomas Linke	Týskland	1
Hasan Gokhan Sas	Turkaland	1
Dario Rodriguez	Uruguay	1

HM-bólkarnir

Bókur A		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Danmark	1	1	-	0	-	0	2	1	1	3
2	Senegal	1	1	-	0	-	0	1	0	1	3
3	Uruguay	1	0	-	0	-	1	1	2	-1	0
4	Frakland	1	0	-	0	-	1	0	1	-1	0

Bólkur B		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Spania	1	1	-	0	-	0	3	1	2	3
2	Suður Afrika	1	0	-	1	-	0	2	2	0	1
3	Paraguay	1	0	-	1	-	0	2	2	0	1
4	Slovenia	1	0	-	0	-	1	1	3	-2	0

Bólkur C		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Brasilia	1	1	-	0	-	0	2	1	1	3
2	Turkaland	1	0	-	0	-	1	1	2	-1	0
3	Kina	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
4	Costa Rica	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0

Bólkur D		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Suður Korea	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
2	Póland	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
3	USA	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
4	Portugal	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0

Bólkur E		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Týskland	1	1	-	0	-	0	8	0	8	3
2	Cameroon	1	0	-	1	-	0	1	1	0	1
3	Írland	1	0	-	1	-	0	1	1	0	1
4	Saudi Arabia	1	0	-	0	-	1	0	8	-8	0

Bólkur F		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Argentina	1	1	-	0	-	0	1	0	1	3
2	Svoríki	1	0	-	1	-	0	1	1	0	1
3	Ongland	1	0	-	1	-	0	1	1	0	1
4	Nigeria	1	0	-	0	-	1	0	1	-1	0

Bólkur G		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Mexico	1	1	-	0	-	0	1	0	1	3
2	Italia	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
3	Ecuador	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
4	Kroatia	1	0	-	0	-	1	0	1	-1	0

Bólkur H		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Japan	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
2	Belgia	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
3	Russland	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0
4	Tunis	0	0	-	0	-	0	0	0	0	0

i Sosialurin

Blatter illa lýddur

Afturvaldi FIFA-forsetin, Sepp Blatter, varð alt annað enn væl móttikin, undir setanini av HM, sum fór fram undan dystinum millum Frakland og Senegal.

Tá Blatter undir setanini kom fram, ljóðaði eitt risastórt "buuh" frá megin partinum av fullsetta leikvøllinum. Sjálvur tóktist Blatter tó ikki at geva sær far um hetta, men smíltist hann bara aftur, eins og einki var hent.

Diouf til Liverpool

Álopsstjørnan hjá Senegal, El Hadji Diouf hevur boðað frá, at hann og Liverpool hava gjørt sáttmála fyri komandi fimm kappingarárini.

Sostatt hevur Liverpool innan eina viku keypt tveir leikarar úr Senegal. Fyrr í vikuni boðaði Liverpool frá, at teir hava gjørt sáttmála við Salif Diao.

Eftir sigurin hjá Senegal á Fraklandi munnu tey í enska havnarbýnum eisini frøast um, at tað hevur eydnast at fingið tveir sláskar leikarar, áðrenn restin av heiminum fekk hug á teimum. Høvdu teir bíðað eina viku, høvdu teir helst verið noyddir at trivið væl djúpari í mappuna.

Emerson úti

Liðskiparin hjá Brasilia, Emerson, varð sunnudagin somikið álvarsliga skaddur, at hann ikki fær spælt við í nøkrum dysti undir HM.

Óhappið hendi, tá hann undir venjing ætlaði sær at spæla málverji eina løtu. Tá hann tveitti seg eftir einum skoti frá Rivaldo var hann somikið óheppin, at hann datt skeivt niður, og úrslitið gjørdist, at óstbeinið fór úr lið, soleiðis at hann verður noyddur at bindda frið komandi fýra vikurnar.

Hálvan veg

Hóast hann enn bert hevur spælt ein dyst, so er týski Miroslav Klose longu komin hálvan veg í kappingini um at gerast HM-toppskjútti. Seinastu sjey HM-kappingarnar hevur toppskjúttin í kappingini skotið seks mál, so nú resta bert trý mál afturat hjá Klose.

Eitt hat-trick er tó ikki nakað garanti fyri einum plássi ovast á máltindinum. Gabriel Batistuta hevur sum hin einasti skotið hat-trick í tveimum ymsum HM-kappingum, men hvørja ferðina hevur tað tó eydnast honum at vinna gylta skógvin.

Innanhýsis kapping

Tá Fernando Hierro móti dystarenda skoraði móti Slovenia, setti hann aftur nýtt met. Verjuleikarin, Hierro, er nevnliga metmaður í málum á spanska landsliðnum. Málið móti Slovenia var hansara 28. í landsliðstroyggjuni, og økti hann sostatt um fjarstøðuna niður til næsta mannin á listanum, Raul.

Raul hevði annars minkað munin niður í eitt mál, men nú eru so aftur tvey mál millum teir báðar Real Madrid leikararnar. Ivaleyst fer tað tó at eydnast hjá Raul at gerast mest skorandi spanióliin. Við sínum 24 árum hevur hann í øllum førum tiðina fyri sær í so máta.

Drúgvir málskjúttar

Við málum sínum sunnudagin hava Fernando Hierro og Gabriel Batistuta skotið mál í trimum HM-endaspølum, og tað eru tað ikki so nógvir leikarar, sum have megnað. Bert tríggir leikarar, Diego Maradona, Pelé og Uwe Seeler hava skotið mál í fýra endaspølum, og sum tað framgongur av listanum niðanfyri, høvdu 13 leikarar undan teimum báðum málskjúttunum sunnudagin skorað í trimum endaspølum:

Diego Maradona - 1982, 1986, 1990, 1994
Pelé - 1958, 1962, 1966, 1970
Uwe Seeler - 1958, 1962, 1966, 1970
Lothar Matthäus - 1986, 1990, 1994
Jürgen Klinsmann - 1990, 1994, 1998
Julio Salinas - 1986, 1990, 1994
Roberto Baggio - 1990, 1994, 1998
Rudi Völler - 1986, 1990, 1994
Gabriel Batistuta - 1994, 1998, 2002
Zico - 1978, 1982, 1986
Joe Jordan - 1974, 1978, 1982
Grzegorz Lato - 1974, 1978, 1982
Pierre Littbarski - 1982, 1986, 1990
Michel Platini - 1978, 1982, 1986
Dominique Rocheteau - 1978, 1982, 1986
Karl-Heinz Rummenigge - 1978, 1982, 1986
Andrzej Szarmach - 1974, 1978, 1982
Fernando Hierro - 1994, 1998, 2002

Batistuta í topp 10

Umframt at hann nú hevur skotið í trimum endaspølum, so hevur Gabriel Batistuta nú eisini skotið seg upp millum teir fáu, sum hava skotið í minsta lagi 10 HM-mál. Batistuta er einasti argintnski landsliðsleikarin á listanum, sum nú telur 12 leikarar:

Gerd Müller – Týskland - 14
Just Fontaine - Frakland - 13
Pelé - Brasilia - 12
Gary Lineker - Ongland - 11
Jürgen Klinsmann – Týskland - 11
Sándor Kocsis - Ungarn - 11
Grzegorz Lato - Póland - 10
Karl-Heinz Rummenigge – Týskland - 10
Teófilo Cubillas - Peru – 10
Helmut Rahn – Týskland - 10
Roberto Baggio - Italia - 10
Gabriel Batistuta - Argenina - 10

Týskt met

Týski sigurin á Saudi Arabia er hin størsti hjá tjóðini í HM høpi, og samstundis hin størsti HM-sigurin í 20 ár.

Bara Ungarn (10-1 á El Salvador í 1982 og 9-0 á Suður Korea í 1954) og Jugoslavia (9-0 á Zaire í 1974) hava vunnið størri sigrar í HM-høpi.

Heintze er aldursforseti

Danski liðskiparin, Jan Heintze, er elsti leikarin, sum tekur lut í HM kappingini hesaferð. Tá Danmark og Uruguay spældi, var Heintze 39 ár og 288 dagar.

Enn er tó nakað upp til leikaran, sum var hin elsti í HM-høpi yvirhøvur. Tað var Roger Milla hjá Cameroon, sum í dystinum móti Russlandi í HM í 1994 var 42 ár og 39 dagar. Í tí dystinum vórðu annars trý met sett. Umframt at verða elsti leikarin í HM-høpi, gjørdist Milla eisini elsti málskjúttin í tí dystinum, ein og russiski Oleg Salenko setti met, tá hann sum einasti skeyt fimm mál í einum og sama dysti.